SOSIALURIN

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
tlf. 1820

Blaðstjóri:
Torfinn Smith


Fram eftir fummum?


TAÐ kann vera at tað er lætt at koma við atfinningum hjá einum mótmælisflokki á tingi. Men so skal vera skil og meining í. Bert at koma við býttisligum briksli og ymsum ókvæmisorðum av versta slagi, tað kann ikki annað enn merkja blaðið ella mannin, ið tað skrivar.

NÚ hendi tað løgna, at Dagblaðið nú í vikuni legði grovan eftir landsstýrinum, tí tað hevði fingið sær sakkunnleika við tí fyri eyga at finna fram til eina inntøkuskipan, sum– á best møguligan hátt gav landskassanum tær inntøkur, ið tørva, samstundis sum ætlingin var enn betur at fáa fatur á teimum inntøkum, ið skyldugar eru at lata skatt, ella við øðrum orðum at gera byrðina hjá borgarum landsins so rættvísa sum gjørligt.

MEN nú er tað einaferð so, at tað sum kann standa í Dagblaðnum mangan er av slíkari náttúru, at júst teirra egnu venda sær frá teirra orðum við andstygd, tí hvør sum er rættsiktaður veit við sær sjálvum, at tað er ábyrgdarloysi ikki at fyrireika seg væl og virðisliga, serliga tá um ræður at býta byrðirnar sum borgarin skal bera.

TAÐ fer tó neyvan at henda á hesum sinni, nú inntøkur skulu fáast til landskassan, at henda sonevnda meirvirðisskipanin verður sett í verk, men landsstýrið ætlar at skipa fyri hesum inntøkulagi, sum so kann setast í gildi, tá fyrireikingarnar eru gjørdar.





Skip	Úr København	Úr Aalborg	Úr Halmstad	Úr Leith	Í Føroyum
Blikur	21.2.	18.2.			24.2.
Falkur				25.2.	28.2.
Norðvíkingur	27.2.	25.2.	26.2.		3.3.
Blikur	7.3.	4.3.			10.3.
Norðvíkingur	13.3.	11.3.	12.3.		17.3.
Blikur	21.3.	18.3.			24.3.

Falkur fermir í Delfzijl, Hollandi 22. februar.

PF SKIPAFELAGIÐ FØROYAR

Skula tit brúka bil

persónkoyring ella skúlakoyring, so snarið tlf. 3456

Alexander Dalfoss

3 bátar til sølu

Útróðrarbátarnir NORDA FAR nr. 1, 7 og 8 eru til sølu. Bátarnir eru bygdir í 1965. Teir standa í Føroy ingahavn.

Pf. Grønlandsfelagið Telefon 1208 - Tórshavn

FÆRØSK MARGARINE

Vita No 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

Framsýningin í Losjuni er opin í dag frá kl. 14—19.

Ingálvur av Reyni

Listakapping

Sum síðsta ár vilja vit aftur í ár — síðst í mai — hava eina málningar- og tekningar framsýning — fyri amatørar.

Upplýsingar um at vera við, fáast við at venda sær til AMNESTY INTERNATIONAL, postbox 219 ella tlf. 3134.

Ung genta!

Vit søkja eftir ungari gentu at ganga ørindi og gera fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Skrivlig umsókn verður at senda til

TRYGGINGARSAMBANDIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin

HAVNIN SKAL SKÍNA

Sjónleikatíðindi

(Framhald frá 1. síðu)

revsaði afturhald og trongskygni, hetta vistu øll, hóast í mongum »góðum« heimi bann varð sett fyri at taka navn hans ara uppá tunguna. At finnast at, var tá eins og nú innan ávísar bólkar sera illa dámt, serliga tá um moralskar og samfelagsspurningar galt. Eisini tá høvdu hesir somu bólkar ikki so lítla ávirkan á vanliga fólkahugsan. Krútið varð tískil heldur ikki spart á hesum sinni, og illsinnis gleffsini fuku mestsum í blindi frá andstøðumonnum skaldsins. Og kanna vit eftir í dag vóru dómararnir har eftir. Við HED DU GABLER lumpaði Ibsen nevniliga andstøðuna. Hann var ikki samfelagsrevsari hesa ferð. Kanska var tað tí, at hann ikki tímdi longur. Hann var staddur í hørðum sálarligum andróðri, og við hesum leiki ger hann eirindaleyst upp við *seg sjálvan* — fyrst og fremst. Men hetta høvdu eingir av ummælarunum hugsa sær, og fáir vóru teir í dugdu at gera seg leysar av vanahugsanum um skriving Ibsens.

Men meiri óheftar metingar hava broytt hesar áskoðanir, og í dag verður leikurin sýndur á óteljandi leikpallum kring allan heimin, — og frá leygardegi komandi eisini her á landi.

Kravmikla lutverk Heddusar er lagt í hendurnar á Kirstin Danielsen og í samspæli við hana síggja vit Tove Johannessen. Hini konufólkini eru Kristina Øster og Magna í Stórustovu. Mannfólkini verða leikt av Olivuri Næss, Óla Kurt Hansen og Eyðuni Johannessen, sum eisini hevur staðið fyri uppsetingini og leiktjøldunum. Heðin Brú hevur umsett.

Hon: Eg kann ikki minnast til melodiin; men ordini vóru ið hvussu er: Taratim, taratam, di bao, dao dutti, tuli tatta teia ...

- Føroyski ...

(Framhald frá 1. síðu)

ar frá ferðini eru sendar til avvarandi myndugleikar: Føroya Landsstýri, Ríkisumboðið og Føroya Lærараskúla.

Tað ið undrar ein lesandi er at hann beinanvegin sær, at maðurin, ið forsvarar at føroyski skúlin avgjørt er á hædd við aðrar, ikki dugir at nýta ein føld bíløt á rættan hátt. Hann sigur, at lærараskúlin fekk tak yvir høvdið, so at hann kundi seta fótur undir egið borð, áðrenn hann fylti 100. So er at spyrja: Hvat er hetta fyri høvd? Hvat er hetta fyri tak? Hvat er hetta fyri borð? Og hvat er hetta fyri bein, ið hetta nevnda høvd hevur sett undir egið borð? Ein kann persónifisera, men tað má vera greitt *hvat*. Lærараskúlin stendur úti, so vítt, vit vita — og tað gjørdi hin eisini. Hann hevur einki høvd. Hann hevur tak, men tað hevði hin gamli eisini — og borð við. Hann sigur, at Føroya Lærараskúli er 100 pst. danskur — og tosar samstundis um at seta fótur undir egið borð. Síðani harmast hesin løgni maður yvir at skúlin (100 pst. danskur) ikki verður vígdur á rótføroyskan hátt, áðrenn hann fyllir 100, tí tá undirstrikar hann eitt sjónligt band, ið altíð hevur verið millum kirkju og skúla. Her hevur gingið væl uttan vígslu. Sannleikin man helst vera tann, at e.ig. hevði verið glaður fyri at sætt nakrar av hesum monnum, sum hann er so íðin at renna á leistum fyri, upptraðka í seremonium og »sjálvforherligilsi«. — Stutt sagt: Ein greytur, ið neyv an er nakað prógv fyri at skúlin her á landi ikki er eftirbátur. — Føroyska skúlablaðið er neyvan nøkur oddaskúta í anda heiminum, og fólkið á brúnni er fylt við sjálvgleði og blint.

At tað er blint er lætt at síggja, tá vit lesa citat frá sama blaðstjóra: »Nú hildu vit, at vit skuldu hyggja at nøkrum heilt øðrum«. Tí hetta er skeivt. Vit fóru til Týsklands 1968 fyrst og fremst fyri at fáa kunn leika um málið — hitt at vit sóu, at skúlaviðurskifti yvirhøvur og at miðalstøðan hjá næmingunum vóru *væl* hægri enn í Føroyum (á Strondum íroknað) nýtist ikki vera aðalkjarna í oddagrein e's í garði...

Tá so hesin blaðstjóri seinni í greinini fer at sitera Reidar Myhre, ið hevur skrivað Pædagogisk Idéhistorie frá *1964*, so sæst at e.ig. rættiliga válkar sær í gleðini við at hyggja aftur um seg, tí vit sóu ongan skúla eldri enn frá 1966, so hjá okkum at fara at taka hetta gamla sitat fyri fult, tað tora vit ikki, tá vit síggja okkara egnu orð á føroyskum vera so sundurlimaði. Er nakað galið við føroyska skúlanum er tað, at alt ov nógv er hugt aftur um bak. —

Vit vilja tó viðganga, at pástandurin: »Føroyski skúlin afturúrsigldur« ikki er beinur. Lat okkum heldur siga: Føroyski skúlin hevur aldri verið so frammalaga, at hann hevur ver ið ájavnt við skúlan í grannalondum okkara.

Vónandi verður tað skjótt at allir óvígdir skúlar verða vígdir, tí hetta er aðalevni í S..... blaðnum og at ummæla vígslur er tradition í hesum blaði — er tað enn ikki ásett við lóg í landinum. Løgið at onki er at skriva um uttan vígdar skúlar og nekrologar, tí mangt máttu skúlamenn, sum sita heima á garði og sum halda sínar skúlar standa eins frammalaga og teir í grannalondum okkara, — mangt máttu teir vita um skúlar í Týsklandi, um ikki annað so frá konuni, sum edrú og andaliga vakt kemur aftur av Danmarkarferð.

Tó, tað nyttar helst onki at siga hjá okkum neyðar lærараnæmingum udi Færø, tá gudar og hálvgudar sum e.ig. eru førir fyri at broyta allar veruleikar — skuldu teir enn funnist her ella í Týsklandi. —

Hann sigur seg bíða í tolni inntil vit koma út og biður Antonius halda mótinum uppi. Ístaðin fyri at bíða hevði e.ig. gjørt klókt í at fara hagar í útluftningstólini eru — tí luftin, hann innandar sýnist, eftir skrivihátthinum at døma, at vera brúkt fleiri ferðir.